

*Anders Dahl Christiansen er danskur landsliðsvenjari í golf*

# Golf

***Performance Optimering***

**Danski landsliðsvenjarin í golf, Anders Dahl Christiansen, heldur fyrilestur í ÍSF-húsunum um Performance Optimering innan golf og aðrar ítróttagreinar**

Fríggjadagin 29. Apríl kl. 17.00 skipa ÍSF og DSNÍ fyri einum áhugaverdum fyrilestri, har landsliðsvenjarin í Golf, Anders Dahl Christiansen tosar um Performance Optimering innan golf og annan ítrótt. Fyrilesturin verður í ÍSF-húsinum í Gundadali og er ókeypis.

Anders Dahl Christiansen hevur í 5 ár verið landsliðsvnjari fyri danska golflandsliðið, sum í 2010 fekk bestu úrslitini nakrantíð.

Anders fer at greiða frá um, hvussu tú kanst seta tær mál og eftirfylgjandi náa málini, og hvussu heilin kann venjast til at taka lærdóm til sín, soeliðis at man nær eina soevnda "super-learning-state".

Framferðarhátturin, sum Anders gjøgnumgongur í sínum fyrilestri, kann brúkast innan ítrótt og kann eisini brúkast í øðrum pørtum í lívinum, har vit ynskja persónliga framgongd.

# Danir áhuga í virkinum í Vestmanna

**FISKUR** Stjórin í samtakinum, sum eisini eigur fiskavirkið í Vestmanna, váttar, at eitt felag á Bornholm, sum kallast Espersen, hevur spurt seg fyri um møguleikarnar fyri at keypa fiskavirkið í Vestmanna

Vilmund Jacobsen

Fyri sløkum tveimum mánaðum síðan læt samtakið, sum keypti seks ísfiskaskip og fýra virkir, fiskavirkið í Runavík uppaftur. Hetta er soleiðis einasta virki av teimum fýra, sum felagið hevur latið uppaftur.

Fiskavirkið í Vági er selt Faroe Farming, og lítið hevur bent á, at fiskavirkið í Vestmanna fer at verða latið uppaftur í bræði.

Á Toftum er heldur einki virksemi komið í gongd aftur.

## Útlendskur áhugi

Tað hevur ljóðað, at eitt felag á Bornholm, sum kallast Espersen, hevur víst fiskavirkinum í Vestmanna áhuga.

Jógvan Dávid Jacobsen, sum er annar av stjórunum í samtakinum, sum keypti hesi gøgn úr trotabúnum eftir Faroe Seafood, váttar, at Espersen-felagið hevur spurt seg fyri um fiskavirkið í Vestmanna.

Hann sigur, at ein fyrispurningur er eisini úr Føroyum um júst hetta virkið.

Jógvan David Jacobsen sigur seg ikki vita, hvat felagið á Bornholm ætlar at brúka virkið til, um tað kemur til keyp.

– Men tað er rætt, at Espersen á Bornholm hevur spurt seg fyri, men enn veit eg ikki, um nakað kann spyrjast burtur úr hesum, leggur stjórin aftrat.

Tað er einki til hindurs fyri, at útlendingar eiga virkir á landi í Føroyum, eins og hálendingar eiga at kalla alt virkið hjá Faroe Pelagic í Kollafirði.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Espersen á Bornholm hevur spurt seg fyri um møguligt keyp av fiskavirkinum í Vestmanna. Tað váttar stjórin í samtakinum, sum eigur virkið, Jógvan Dávid Jacobsen*

## Í MORGIN

**8/12°C**



5-10 m/s 5-10 m/s

Gul til andøvsgul av suðri, 5-10 m/sek. Tað verður mest skýggjað veður, og kanska fer at regna. Hitin verður millum 8 og 12 stig. Fríggjanáttina verður frískur vindur av landsynningi, 5-10 m/sek. Tað verður turt og klárari í veðrinum. Hitin fer at liggja um 5 stig.

## FRÍGGJADAGIN

**8/12 °C**



5-10 m/s 5-10 m/s

Gul til andøvsgul av landsynningi, 5-10 m/sek. Tað verður mest turt og nakað av sól. Hitin fer at liggja millum 8 og 12 stig.

## LEYGARDAGIN

**8/12 °C**



5-10 m/s 5-10 m/s

Tað verður sama veður, gul til andøvsgul, men nú verður hann eystan í ættini, 5-10 m/sek. Tað verður turt og nakað av sól. Hitin fer at liggja millum 8 og 12 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ







## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 88 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

**Hitalagið kring knøttin**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. apr | 02:39 | 15:15 | 01:39 | 14:15 | 01:54 | 14:30 | 04:39 | 17:15 | 05:39 | 18:15 | 00:54 | 13:30 | - | 12:30 | 02:54 | 15:30 | 03:54 | 16:30 | 02:24 | 15:00 | 03:39 | 16:15 |
| 27. apr | 03:35 | 15:55 | 02:35 | 14:55 | 02:50 | 15:10 | 05:35 | 17:55 | 06:35 | 18:55 | 01:50 | 14:10 | 00:50 | 13:10 | 03:50 | 16:10 | 04:50 | 17:10 | 03:20 | 15:40 | 04:35 | 16:55 |
| 28. apr | 04:14 | 16:34 | 03:14 | 15:34 | 03:29 | 15:49 | 06:14 | 18:34 | 07:14 | 19:34 | 02:29 | 14:49 | 01:29 | 13:49 | 04:29 | 16:49 | 05:29 | 17:49 | 03:59 | 16:19 | 05:14 | 17:34 |
| 29. apr | 04:53 | 17:13 | 03:53 | 16:13 | 04:08 | 16:28 | 06:53 | 19:13 | 07:53 | 20:13 | 03:08 | 15:28 | 02:08 | 14:28 | 05:08 | 17:28 | 06:08 | 18:28 | 04:38 | 16:58 | 05:53 | 18:13 |
| 30. apr | 05:30 | 17:47 | 04:30 | 16:47 | 04:45 | 17:02 | 07:30 | 19:47 | 08:30 | 20:47 | 03:45 | 16:02 | 02:45 | 15:02 | 05:45 | 18:02 | 06:45 | 19:02 | 05:15 | 17:32 | 06:30 | 18:47 |

Kelda. Álmanakkin 2011